LØGTINGIÐ

Løgtingsformaðurin

Tíðindaskriv

**24. juli 2020**
**j. nr.**
(at tilskila í svari)

**Viðvíkjandi setanini av Løgtinginum ólavsøkudag v.m.**

Orsakað av støðuni við Covid-19 smittuvandanum verður setanin av Løgtinginum ólavsøkudag og viðurskiftini rundan um hetta skipað øðrvísi í ár enn undanfarin ár.

Skrúðgongan fer sum vant úr Løgtinginum oman í kirkjuna til gudstænastu og niðan aftur aftaná. Eitt minni kór enn vanligt fer at syngja á tinghúsvøllinum, og økið rundan um tinghúsini verður meira avbyrgt enn vanligt.

Heitt verður á fólk um ikki at stúgvast saman á Vaglinum og rundan um Løgtingið hesa løtuna, sum í ár fyrst og fremst er ætlað sum ein møguleiki hjá fólki at kunna fylgja við hátíðarløtuni í sjónvarpi heimanífrá ella aðrastaðni. Á henda hátt ber til at fylgja tilmælunum frá myndugleikunum um í mestan mun at halda ólavsøkuna heima í nærumhvørvinum.

Tingfundurin í ár verður hildin fyri afturlatnum hurðum, soleiðis at skilja, at almenningurin hevur ikki atgongd til Løgtingið. Karmarnir í tingsalinum loyva ikki, at fleiri enn tey, sum neyðturviliga skulu vera har, kunnu vera til staðar. Møguligt er tó at fylgja við tingfundinum í sjónvarpi, í FM-tingvarpinum ella á internetinum.

Undanfarin ár hevur verið møguligt hjá almenninginum at vitja tingið og síggja hølini ólavsøkudag. Hesin møguleikin verður tíverri ikki í ár orsakað av serligu støðuni.

Løgtingsformaðurin fer at heita á øll um at vísa størsta varsemi og fylgja almennu tilmælunum frá heilsumyndugleikunum viðvíkjandi Covid-19 støðuni, og fer annars at ynskja øllum eina góða ólavsøku og Guds ríku signing.

Jógvan á Lakjuni
løgtingsformaður

TINGHÚSVEGUR 1-3
POSTBOKS 208
100 TÓRSHAVN
TLF. 363900
FAX. 363901

LOGTING.FO